# Fantastiskir fes



Stóru konsertirnar á Summar Festivalinum fáa rættiliga lív í fjøldina, og tað er hugaligt hjá bólkunum á pallinum at uppliva, hvussu fólk taka undir við teirra tónleiki



**Fjórði Summar Festivalurin er fyri framman, og um hesin festivalurin livir upp til teir undanfarnu, so verður talan um eitt ótrúliga spennandi og hugaligt tiltak**

Summar Festivalurin er ein sólskinssøga í føroyskum mentanarlívi. Burtur úr ongum er ein altjóða festivalur komin upp at standa í miðbýnum í Klaksvík, og áhugin fyri festivalinum er so stórur, at talan er um størsta tiltak av sínum slagi í landinum.

Orsøkin til hetta er fyrst og fremst, at fólk í stórum stíli hava tikið undir við hugskotunum og eru komin undanfarnu festivalarnar.

Eftir at eini 4.000 fólk vóru til fyrsta tiltakið í 2004, er áhoyraratalið meira enn tvífaldað, og í ár verður roknað við, at tað kunnu koma 10.000 fólk á festivalin.

Summar Festivalurin er nógv meira enn bert eitt tónleikatiltak. Sosiala samvera millum mongu festivalgestirnar er av sera stórum týdningi, og fyrireikararnir hava øll árini lagt dent á, at fólk skulu hava eitt gott og hugnaligt upplivilsi á festivalinum – bæði børn og vaksin skulu finna undirhald, upplivingar og hugna.

Jú, sanniliga fæst nógvur góður tónleikur á Summar Festivalinum – ikki minst nú heimsstjørnur sum Scorpions og Kim Wilde koma á festivalin í ár – og tað hava longu verið nakrar stórar konsertir á Summar Festivalinum.

Bólkar, sum tað fyri fáum árum síðani ikki var hugsandi um at fáa til Føroya, standa nú á pallinum á Vágsbøi, og tá ið týsku Scorpions fara á pallin fríggjakvøldið, verður helst talan um størstu rockkonsert í Føroyum nakrantíð.

Vælkomin á fjórða Summar Festivalin.



Børnini sleppa at sita á hestbaki



Finski rockbólkurin The Rasmus hevði eina framúr góða konsert í 2006

